# Bankar fáa hjálp

Leiðslan í danska Tjóðbankanum umhugsar, um hon skal gera tað lættari hjá donskum peningastovnum at læna pengar úr Tjóðbankanum, so teir ikki koma í trupulleikar av ófriðinum á altjóða fíggjarmarknaðinum. Tað segði Niels Bernstein, tjóðbankastjóri, í gjár. Hann segði, at eingin væl rikin danskur peningastovnur skal koma í trupulleikar av altjóða fíggjarkreppuni, men hann vildi ikki siga, um nakar hevur tørv á lagaligari lánstreytum.



*Niels Bernstein er stjóri í Tjóðbankanum*

*Mynd: DR)*

# Vegleiðaraútbúgving lýst

Føroya Læraraskúli lýsir í vikuskiftisbløðunum við nýggju útbúgvingini til lesivegleiðara. Útbúgvingin verður á universitetsstigi. Hon er 30 ECTS, og talan verður um parttíðar lestur, lutvíst í samstarvi við útbúgvingarstovnar í útlondum. Í lýsingini verður roknað við, at umsøkjararnir hava læraraútbúgving, og at teir hava minst tvey ára starvsroyndir innan økið. Sambært lýsingina verður farið undir útbúgvingina í august 2008, og hildið verður fram inntil 1. juli 2010. Sambært lýsingini skulu umsóknir vera Lærarskúlanum í hendi í seinasta lagi hósdagin 8. mai. Í fíggjarlógaruppskotinum er játtan til Lærarskúlan til sjálva útbúgvingina, og Mentamálaráðið hevur sambært fíggjarlógaruppskotinum sett pengar av til vikarar til teirra, ið fara undir útbúgvingina og tískil fara at fáa tímaniðurskurð.

# mong ár aftrat

## FAKTA

Tingið:

### Fimm minnilutar um ein tunnil

**Hin 4. mars** løgdu teir tríggir norðoyatingmenninir, Anfinn Kallsberg, Jákup Mikkelsen og Bjørn Kalsø fram uppskot til nýggjan tunnil við tilhoyrandi vegasambandi millum Klaksvík, Árnafjørð og Depil.

**Málið** varð síðani beint í Vinnunevndina, sum hevur havt fund við umboð fyri kommunurnar í Klaksvík, Viðareiði og Hvannasundi, landsstýriskvinnuna í vinnumálum og landsverkfrøðingin.

**Eftir viðgerðina** hevur vinnunevndin býtt seg í fimm minnilutar – ein sum tekur undir við uppskotinum; tveir sum við ymiskum grundgevingum taka støðu í tingsalinum, og tveir sum við ymiskum grundgevingum eru ímóti uppskotinum.

**2. viðgerð** av tingmáli 134/2007 verður mánadagin 5. mai. Hetta er 7. málið á skránni til henda tingfundin.

Bjørt:

### Eingin pengar í ár

- Eingin játtan verður til tunnilin Norður um Fjall í ár, staðfestir vinnumálaráðharrin, Bjørt Samuelsen.

Mikudagin segði hon við Rás2 at 0 krónur eru á fíggjarætlanini fyri 2008 til henda tunnilin og tann Viðareiðis.

Miðað verður kortini eftir, at 10 mió krónur skulu setast á fíggjarlógina næsta ár.

fáa nýggjan tunnil, hóvar Theodor og bygdarfólkinum sera illa. Sjálvur hevur hann hoyrt um fólk, sum kundu hugsað sær at keypt grundøki í Árnafirði um betri samband var til Klaksvíkar.

- Tí sært tú: Gekk tunnilin hiðani frá og kom út í Gerðabø, so tók tað okkum bert einar 2-3 minuttir at koyra til miðbýin í Klaksvík.

- Men við útlitunum í løtuni, verður hetta neyvan veruleiki í bræði. Og hetta kemur sjálvandi at merkja, at fólk hugsa seg um tvær ferðir, áðrenn tey vilja búseta seg her, slær Theodor Olsen fast.




*Fleiri uppskot eru til loysn av samferðsluni í økinum norðanfyri – ein úr Ánunum og ein av Gerðaboi. Felags er tó at Árnafjørður verður samanbundin við Klaksvík og økið norðanfyri*

*Mynd: Landsverk*



*Næmingarnir í 2. A í Sankta Frans skúla á fyrsta sinni umborð á gamla føroyska árabátinum, sum Jógvan Hansen (uttast vinstrumegin) hevur smíðað. – Tað er neyðugt at varðveita hetta slagið av bátum, sigur hann*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Føroyskur bátur við seks stavnum

**Ein av lærugreinunum í fólkaskúlanum er heimstaðarlæra. Ymiskt er, hvussu nógv ein ger burtur úr, men í Sankta Frans skúla í Havn hava tey hava bátasmíð á skránni**

UNDIRVÍSING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Í vetur hava næmingarnir í 2. A nýtt ein part av tímunum til at hyggja eftir føroyskum bátasmíði.

Tey hava verið í teirri hepnu støðuni, at lærari teirra, Jógvan Hansen úr Kollafirði hevur so stóran áhuga í hesum, at hann sjálvur hevur bygt eitt 4-mannafar í frítíðini.

Jógvan er bert 30 ára gamal, men hevur hann longu bygt fýra slíkar, hóast hann ikki hevur lært til slíkt.

- Eg geri tað bara av áhuga mínum fyri at varðveita tann gamla føroyska árabátin, sigur hann.

Í undirvísingini hevur hann lært tey so at siga alt, sum er vert at vita um føroyska árabátin. Í dag vita øll børnini, hvat ein tollur er, hvat eygað er, hvat eitt borð er og mangt annað sum onnur havnarbørn neyvan vita so nógv um.

Samstundis hevur lærarin víst teimum myndir av, hvussu byggingin av gamla árabátinum, sum skal latast til Kiwanis-felagsskapin, hevur gingið framá.

Fyrrapartin í gjár var stundin komin, at næmingarnir sjálvir sluppu at síggja verkið: Í einum bilhúsi Undir Heygnum stóð tann lidni báturin fyri teimum.

- Altso, sum hann er vakur, segði ein av gentunum. – Hann er øgiliga væl gjørdur og flott pussaður!

Til æru fyri myndamannin fóru teir fýra dreingirnir í flokkinum og allar genturnar umborð á bátin.

Hetta fekk lærara teirra at siga so rámandi: - Vanliga eru tveir stavnar í einum báti. Men í dag mugu vit vist siga, at teir eru seks í tali!